TOFTA SKÚLI
Heygsvegur 28 FO-650 Toftir Tel 447332 tof@skulin.fo toftaskuli.fo

# Lærarastørv Tofta skúla

Hesi lærarastørv verða lýst leys at søkja til skúlaárið 2019/20 til setanar frá 1.august 2019:

- **2 føst størv**
- **4 tíðaravmarkað størv** skúlaárið 2019/20 vegna barnsburðarfarloyvi, farloyvi, lækkað tímatal og avlopstímar.

  Endaliga tímatalið og setanin til eitt av tíðaravmarkaðu størvunum verður endaliga ásett eftir 1. september.

**Skúlanum tørvar lærarar, ið serliga kunnu átaka sær at undirvísa í:**
- Støddfrøði, ítrótti, heimstaðarlæru í innskúlingini
- Enskum, donskum, týskum, landafrøði, alis-evnafrøði, lívfrøði, søgu/samtíð, heimkunnleika í framhaldsdeildini
- Tónleiki og SI

**Vit vænta at tú:**
- ert fyrikomandi, umhyggin, álítandi og dugir at samstarva
- vil taka á teg tær uppgávur sum eru í skúlanum
- í tøttum samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vil vera við til áhaldandi at menna skúlan
- Vilt fevna ymiskleikan og styrkja felagsskapin

**Førleikakrøv:**
Útbúgvin sum fólkaskúlalærari. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir:**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.
Lærarastørvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu sendast til: tof@skulin.fo og vera skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi sunnudagin 23.juni kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini frá Duritu Jakobsen, skúlastjóra á tlf. 565050

---

**Tofta skúli** hevur komandi skúlaár 202 næmingar í 1. – 10.fl.
Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.toftaskuli.fo